


*Tað tykist sum, at tað ræður um høvuðsleyst at tosa við síðurnar av, ella leggja eftir tí, sum skrivar. Um ikki tað, so verður viðmerkingini bara tagd burtur, sigur Torbjørn Jacobsen um føroyska kjakmentan*

# Meiningar uttan tenn í heysinum

**– Í dag skal alt vera stutt og knívskorið. Eingin meining sleppur framat í miðlunum, uttan hon skal sáldast og sílast. Úrslitið er ein politiskt viðmerking, sum ongar tenn hevur eftir í heysinum, sigur Óli Breckmann. Hann og Torbjørn Jacobsen prátaðu um føroysku kjakmentanina í Hvonn Live**

Uni Holm Johannesen

Hittinorðaði Óli Breckmann tekur til.

– Tað er minnilutin av føroyingum, sum hevur innlit í politiska arbeiðið. Tað eru ikki nógv, sum skilja, hvat fer fram í landsstýrinum, løgtinginum, á býráðsfundunum og bygdaráðsfundunum. Úrslitið eru óhvassar sendinginar sum 'Álvaratos' og 'Fólksins Rødd', har innihaldið er slutur og vrøvl, er hansara kontanta niðurstøða.

Teir hava verið í andglettinum á politiska vígvøllinum í nógv ár. Evnini at taka til og at provokera eru framúr. Djarvir og skemtingarsamir, men framvegis í ramasta álvara, hava teir hildið seg framt í annars linligu føroysku kjakmentanini. Við einum óvanliga hvøssum penni hava teir sett sín sermerkta dám á almenna kjakið. Annar er 62 ára gamli akademikarin Óli Breckmann, sum hevur gjørt manngarð um borgarliga politikkin í fleiri áratíggju. Fullkønur og litríkur í føroyskum máli. Sum blaðstjóri á Dagblaðnum og løgtingsmaður stúrdi hann ongantíð fyri at geva øðrum toyggið.

Hin er 55 ára gamli Torbjørn Jacobsen, róptur Tobbi, rokmikli skiparin av Skálafjørðinum. Í barndómsheiminum vóru tingini ongantíð balla inn, men søgd hart og kontant. Tað hevur verið ein týdningarmikil partur av hansara politiska profili. Við myndamáli sum fáur átti hann virknan leiklut, tá fullveldisrørslan fekk nýggja luft undir veingirnar í 1998.

Tobbi tekur til orðanna.

– Pedagogiska kjakið, har hvør einstakur prátar uttan innihald bara fyri at hoyra seg sjálvan, ger ongan mun. Tað er ofta neyðugt at skera inn á bein í einum kjaki. At vera hittinorðaður og at provokera kann flyta kjakið annan vegin, heldur enn at standa í stað, heldur hann.

## Lítið kjak

Óli Breckmann og Torbjørn Jacobsen hava verið ídnir og eyðsýndir kjakarar. Teir dugað væl at tekkjast veljarunum, sum taka undir við teimum, men eisini hinum, sum eru rúkandi ósamdir. Tá teir hava orðið, hava fólk lurtað.

Fyri tveir politikarar, sum stundum hava staðið í fremstu røð og átt høvuðsleiklutin á kjakpallinum, er tað harmiligt, at tað er lítið veiggj í føroysku kjakmentanini. Tað er at kalla lagt í oyði. Sambært teimum, eru tað ov fá, sum tora og vilja varpa sína hugsan út alment. Tað er ikki stimbrandi fyri nakran, er niðurstøðan.

Torbjørn Jacobsen vísir á eina kronikk, sum Eyðun Joensen skrivaði fyri tveimum vikum síðan. Hann spurdi, hví føroysku akademikararnir, sum hava lisið uttanlands í fleiri ár, ikki taka lut í kjakinum, tí tað er sanniliga saknur í teimum. Tobbi tekur undir við Eyðuni Joensen.

– Kjakið er á so lágum støði, at innihaldið í viðmerkingunum verður sjáldan tugt og endavent. Tað tykist sum, at tað ræður um høvuðsleyst at tosa við síðurnar av, ella leggja eftir tí, sum skrivar. Um ikki tað, so verður viðmerkingini bara tagd burtur. Føroyska kjakið var frægari fyri bara 10 árum síðan, sigur Torbjørn Jacobsen.

Óli Breckmann var fyri fyrstu ferð valdur á ting í 1974. Hann hevði verið løgtingsmaður í 10 ár, tá føroyska sjónvarpið fór at senda. Tað var ein kollveltandi broyting, sigur hvassoygdi fólkafloksmaðurin.

– Í dag skal alt vera stutt og knívskorið. Eingin meining sleppur framat í miðlunum, uttan hon skal sáldast og sílast. Úrslitið er ein politiskt viðmerking, sum ongar tenn hevur eftir í heysinum. Tá ber illa til at fara í dýpdina við nøkrum sum helst. Tað er ein trupulleiki, at fólk ikki tora at siga sína hugsan, tí tey bera ótta fyri at missa arbeiðið ella okkurt. Um vit ikki hava frælsi at blanda okkum, enda vit skjótt sum í gøtunum í Kairo, sigur Óli Breckmann og leggur afturat, at tað er ikki longur rúm fyri nógvu kjaksendingunum, sum hava verið í almenna útvarpinum og sjónvarpinum, meðan hann hevur verið løgtingsmaður.

## Brúka lætt mál

Slutur og vrøvl, er skoðsmálið, sum Óli Breckmann gevur útvarpssendingini 'Álvaratos' og sjónvarpssendingini 'Fólksins Rødd'. Tað eru hinvegin føroysku politikkararnir, sum eiga ein part av orsøkini. Sum fólkavaldur politikari er tað eitt krav og ein skylda at brúka ein málburð, sum øll skilja. Ein eginleiki, sum politikarar kunnu bøta um.

– Uppgávan hjá politikarum er eisini at skapa áhuga og at kunna veljararnar. Um eingin skilir tín málburð, so tíma veljararnir ikki at luttaka. Tú skal tosa týðiliga fyri at fólk tíma at lurta eftir tær, sigur Óli Breckmann.

Torbjørn Jacobsen saknar ungdómsarbeiði í føroyskum politikki, sum brynjar yngra ættarliðið at vera politikarar. Tað er avmarkað, hvussu nógv flokkarnir kunnu leggja fyri, men tað er eingin ivi um, at fleiri politikarar mangla politiska skúling, heldur hann.

– Tað er púra tilvildarligt, um tú dugir politikk ella ikki. Tú verður á ongan hátt lærdur upp, men má fáa sum frægast burtur úr sjálvur, sigur Torbjørn Jacobsen.